# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SPØKIR EIK Í TF SAMTAKINUM?

Aðalfundurin hjá Ognarfelag Tryggingartakaranna feldi fríggjadagin uppskotið um at broyta viðtøkurnar fyri felagið soleiðis, at atkvøðuseðlar framyvir skulu sendast út til allar tryggingartakararnar – sum eru teir, sum eiga felagið – heldur enn sum nú, at Tryggingarfelagið sendir atkvøðuseðlar út til teirra, sum ávís valevni við serligum tilknýti fáa Tryggingina at senda út til ávísar veljarar. Altso hevur aðalfundurin valt at varðveita eina sera ivasama og óliðiliga skipan, har demokratiska tilgongdin verður darvað, soleiðis at gjøgnumskygni og opinleiki verða minni. Hetta líkist ikki sørt skipanum, vit kendu úr gomlu kommunistalondunum og framvegis kenna í teimum londum, sum krampaktiga halda falst við foroldaðar skipanir frá farnum tíðum.

Neyvan tora tey, ið ráða fyri borgum í tryggingini at halda fast um hesa skipan serliga leingi afturat. Hesa somu skipan, sum førdi Eik Banka á húsagang, har somu fólk spøkja aftur allastaðni. Eina skipan, har tað er nevndin, sum hevur valdið yvir aðalfundinum. Eina skipan, har nevndin í veruleikanum kann planleggja, hvør kemur á aðalfund og hvør kemur í umboðsráðið og harvið aftur, hvør kemur í nevndina.

At so júst fráfarni stjórin er valdur í nevndina hjá Ognarfelag Tryggingartakaranna kann tykjast bakvent. Sjálvandi kann hann sum meinigur borgari veljast har, nú hann ikki longur er á lønarlistanum hjá Tryggingarfelagnum. Men tað tykist á onkran hátt bekvemt. Tað merkir jú eisini, at hann verður formaður í TF Holding, TF Ognir og TF-Íløgur, tí tað er vanligt, at somu nevndarlimir ganga aftur í øllum feløgum. Gunnar í Liða er somuleiðis nevndarlimur í Eik Banka.

Nú var tað ein outsidari í umboðsráðnum, sum legði fram uppskotið um viðtøkubroytingarnar. Andrass Skaalum var tann einasti, sum førdi valstríð í bløðunum upp undir valið seinast, og hann var eisini tann einasti, sum alment í bløðunum hevur boðað frá, hvussu hann ætlar at varða áhugamál tryggingartakaranna – júst við at demokratisera hetta felagið, sum fleiri túsund føroyingar eiga, og sum harvið eisini eiga Eik Banka. Kortini síggja vit, at somu Tordensskjoldsoldátar ganga aftur – og at vilji ikki er at geva eigarunum ta ávirkan, sum tryggingartakararnir sjálvandi eiga.



Tað er óhugnaligt at hugsa sær tankan, at gamla høpisleysa skipanin hjá Eik spøkir aftur í TF Holding, sum nú er størsti aktørur á føroyska fíggjarmarknaðinum – men har eigararnir ikki fáa ta ávirkan, teir áttu at havt.

**Tordenskjoldssáldátarnir ganga aftur**

## Eigarin fekk ikki ávirkan

Uppskotið um at geva øllum tryggingartakarunum, sum eiga Tryggingarfelagið Føroyar, hvør sín atkvøðuseðil, tá umboðsráðið skal veljast, varð felt fríggjadagin.



Felagið, sum eigur øll feløgini í TF samtakinum, eitt nú Tryggingarfelagið Føroyar og 70 prosent av Eik Banka, eitur »Ognarfelag Tryggingartakaranna«. Og tey sum eiga hetta felagið eru øll tey, sum hava eina trygging hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Men tað er bara ein lítil partur av veruligu eigarunum, sum hevur nakra ávirkan, tí mátin, sum umboðsráðið verður valt uppá, er soleiðis háttaður, at tú skalt biða um at fáa ein atkvøðuseðil fyri at sleppa at atkvøða.

Og tað gera teir allar flestu tryggingartakararnir ikki. Tí skeyt Andrass Skaalum, umboðsráðslimur, upp, at í staðin fyri verður gjørd ein skipan, har hvør tryggingartakari fær eina brævatkvøðu sendandi, sum hann so kann velja at nýta, ella lata vera.

Fyri at samtykkja viðtøkubroytingar skulu tríggir fjórðingar av teimum 23 umboðsráðslimunum atkvøða fyri. Tað gjørdu teir ikki fríggjadagin. Tá atkvøddu 14 fyri og níggju ímóti. Tað vantaðu soleiðis fýra atkvøður til tess at fáa broytingina framda.

Umboðsráðið valdi at halda fast við skipanina, har bert heilt fáir av eigarunum gera sína ávirkan galdandi.

## Gunnar tann sterki

Gunnar í Liða varð á aðalfundinum hjá Ognarfelag Tryggingartakaranna valdur í nevndina við 13 atkvøðum, og hann gjørdist eisini formaður.

Tað verður tí eisini gitt, at fyrrverandi stjórin í TF Holding og í Tryggingarfelagnum Føroyar Gunnar í Liða verður formaður í øðrum feløgunum í samtakinum, eitt nú TF-Holding, tí tað er vanligt, at somu fólk ganga aftur sum nevndarlimir. Hann er eisini nevndarlimur í Eik Banka, sum TF Holding eigur 70 prosent av.

Ingeborg Godtfred varð afturvald í nevndina í Ognarfelag Tryggingartakaranna, meðan nývaldir eru Jónsvein Knudsen, Árni Jakobsen og Gunnar í Liða.

Nevndin sær nú soleiðis út:
Jóhannus Danielsen
Ingeborg Godtfred
Árni Jakobsen
Jónsvein Knudsen
Gunnar í Liða
Jan Müller

Eftir aðalfundin skipaði nevndin seg við Gunnari í Liða sum formanni, og Jóhannusi Danielsen sum næstformanni.

Birgir Mohr, nevndarformaður seinastu tvey árini, sum eisini hevur verið nevndarlimur í samtakinum í 29 ár valdi ikki at stilla upp aftur. Hann hevur sostatt verið við til allar stóru broytingarnar sum eru hendar í samtakinum, seinast keypinum av Eik.

Í tíðindaskrivi takkar felagið





**Tey lágløntu vinna mest**

HANS PAULI STRØM KJAK Á SÍÐU 30



**Ergo gloppar hurðini**

TÍÐINDI Á SÍÐU 12

## Gevið kvinnum skattafrádrátt

Í sendingini Álvarartos í útvarpinum fríggjadagin var eitt av evnunum brátt farni kvinnudagurin og mál, ið snúgva seg um slík viðurskifti. Í panelinum vóru tvær kvinnur og ein maður.



Onnur av kvinnunum, Ása Andreassen, nevndi hetta við, at vit í Føroyum hava ymsar skipanir fyri at behalda ávísar menn í landinum. Vit hava eitt nú sjómannafrádrátt og vit hava handverkarafrádrátt fyri handverkarar, sum arbeiða uttanlands, eins og FAS og DIS og NIS skipanir. Hon eftirlýsti tí eisini ein frádrátt, sum ger, at vit fáa fleiri kvinnur at flyta heimaftur til Føroyar.

Hagtøl vísa, at 2.000 fleiri menn enn kvinnur eru í Føroyum. Logikkurin sigur jú, at um tær fáa einhvønn frádrátt, so flyta tær heimaftur – ella flyta tær ikki av landinum, eins og sjómenn og handverkarar.

Púra beint Ása! Hatta var eitt gott hugskot, sum onkur av okkara kosnu átti at tikið til sín. Vit vilja hava fleiri kvinnur at búgva í Føroyum – tað er jú fortreytin fyri at varðveita føroyska mannin!

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*